# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## SEMENT FINALA

Farna vikuskiftið var fyrri parturin av Sement tónleikakappingini hildin í Perluni í Havn. Kappingin er fyri nýggjar bólkar og einstaklingar. 19 bólkar eru við í kappingini. Tvey innleiðandi umfør vóru farna vikuskiftið, og í kvøld er seinasta innleiðandi kappingini. Leygarkvøldið verður so finalan í Sement.

**SEMENT 2011**
Perlan í Havn
4/2 og 5/2 kl. 20.00



## TÁ MENNINIR HØVDU ALT AT SIGA

Vit eru í New York í 1960'unum, og á lýsingarstovuni Sterling Cooper gongur tað lívliga fyri seg. Hetta er karmurin um røðina Mad Men, sum verður róst til skýggja av ummælarum. Røðin vísir samfelagið, sum tað var tá. Menninir sita í øllum týðandi størvunum, teir roykja og drekka til arbeiðis, og kvinnurnar mugu stundum finna seg í vánaligari viðferð. Higartil eru tríggjar sesongir gjørdar av røðini.

**MAD MEN**
Sjónvarpsrøð, 4 sesongir
Blu-ray



## VANDAMIKLA LYGNIN

Olive Penderghast er ein fitt og friðarlig studentaskúlagenta, men tá hon ger í so nógv av í royndini at greiða frá einum spennandi vikuskifti, fara søgurnar at ganga um, at hon er við uppá tað ringasta. Slaturin er ikki til at steðga, og tí má Olive taka óvanlig stig fyri at normalisera sítt umdømi aftur.

**EASY A**
Biograffilmur
Frá hósdegnum 3/2

## STÓRDYSTUR Í LONDON

Sunnudagin bresta tvey av stóru feløgunum í Onglandi saman í fótbóltsdysti í London. Chelsea, sum hevur haltað nakað seinastu vikurnar, roynir at halda fast í hinum toppliðunum í Premier League. Liverpool hevur seinastu dystirnar aftur roynt at vinna, men nú hava teir stóru uppgávu fyri framman. Serliga spennandi verður at síggja nú fyrrverandi Kop-hetjuni, Fernando Torres, ið skifti til nettup Chelsea á síðsta degi av flytingarvindeyganum.

**CHELSEA-LIVERPOOL**
Premier League
Sunnudagin 6/2
kl. 16.00





## FØROYSKUR DANSUR FYRI UNG

Í kvøld hevur Klaksvíkar Dansifelag eitt dansitiltak, sum serliga vendir sær til unga fólkið. Klaksvíkar dansifelag hevur fleiri ung, sum bæði eru við í barnadansinum og ofta við teimum vaksnu. Hugsanin kom upp, at tey høvdu brúk fyri einum tiltaki bara fyri ung, har tey fingu tað uppá sín máta. Norðoyingar hava møtt væl upp til Ung í dansi og verið glaðir fyri at møta øðrum dansiglaðum ungdómi, verður sagt úr felagnum. Tí fara tey at bjóða øðrum norð til eitt dansikvøld, nú í bestu dansitíð.

**FØROYSKUR DANSUR FYRI UNG**
Skálin í Klaksvík
Fríggjakvøldið 4/2 kl. 20.30



## BJÓÐA TEG FRAM TIL STJÓRASTARV

Innlendismálaráðið søkir nú eftir stjóra til Landsverk. Millum førleikakrøvini eru, at tú skalt hava akademiska útbúgving innan eitt nú verkfrøði, búskaparfrøði ella løgfrøði, og royndir innan leiðslu eru ein ein treyt. Nýggi stjóran skal eisini duga at samskifta væl við starvsfólk, politikarar, fjølmiðlar og onnur. Freistin at søkja starvið er 7. februar.

**STJÓRI Á LANDSVERKI**
Freist at søkja er 7/2 kl. 16.00